TÓRSHAVNAR KOMMUNA



## Heilsu- og umhvørvisdeildin

Heilsu- og umhvørvisdeildin er partur av teknisku deild í Tórshavnar kommunu.

Heilsu- og umhvørvisdeildin umsitur mál, sum sambært umhvørvislóggávuni eru løgd undir kommununa at umsita.

Tekniska deild heldur til í snotiligum hølum í miðbýnum í Havn saman við byggi- og býarskipanardeildini, snarskivuni og postverkinum í gamla posthúsinum.

www.torshavn.fo

## Starvsfólk til heilsu- og umhvørvisdeildina

Søkt verður eftir starvsfólki til heilsu- og umhvørvisdeildina hjá Tórshavnar kommunu at byrja skjótast til ber.

**Førleikakrøv**
Áhugaðir umsøkjarar skulu hava útbúgving sum verkfrøðingur ella aðra viðkomandi útbúgving innan økið.

**Royndir**
Ynskiligt er at umsøkjarin hevur royndir innan heilsu- og umhvørvismálum og innan almenna fyrisiting.

**Persónligir eginleikar**
Dentur verður lagdur á, at umsøkjarin:
- er fyrikomandi og kann arbeiða sjálvstøðugt,
- dugir at samskifta væl í skrift og talu,
- virkar í góðum samstarvi við starvsfelagar, viðskiftafólk og stovnar.

**Vit bjóða**
eitt fakliga og persónliga mennandi starv við nógvum spennandi avbjóðingum í góðum arbeiðsumhvørvi.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Spurningar í sambandi við starvið**
Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til Boða Haraldson, býarverkfrøðing ella Marius Müller, tekniska stjóra á tlf. 315160.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsing um útbúgving og royndir, skal vera Tórshavnar kommunu í hendi seinast fríggjadagin 21. november 2003. Viðmerkjast skal á brævbjálvan 'umsókn um starv til heilsu- og umhvørvisdeildina'.

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



## Starvsfólka-deildin

Starvsfólkadeildin umsitur starvsfólka- og lønarviðurskifti.

Á starvsfólkadeildini starvast fimm fólk. Harumframt eru tríggir næmingar knýttir at deildini.

Deildin umsitur tey gott 1.000 fólkini, ið starvast hjá kommununi. Hesi eru sett eftir umleið 20 sáttmálum, ið øll á deildini tískil mugu hava innlit í.

www.torshavn.fo

## Málsviðgeri til starvsfólkadeildina

Høvuðsuppgávan hjá tær verður viðgerð av lønar- og starvsfólkamálum og aðrar uppgávur í hesum sambandi. Harumframt kemur tú at verða við til at menna ymisku forritini, íð starvsfólkadeildin umsitur og brúkar, soleiðis at deildir og stovnar kommununnar í størst møguligan mun sjálvi kunnu avgreiða síni viðurskifti.

Umframt lønarskipanina verður arbeitt við øðrum elektroniskum skipanum, t.d. journalskipan, starvsfólkaskipan og vanligum skrivstovu forritum.

Fyri rætta umsøkjaran er talan um eitt sera spennandi og avbjóðandi starv við nógvum ymiskum uppgávum. Harumframt kemur tú at samskifta við leiðarar og starvsfólk kommununnar.

**Setanarviðurskifti**
Starvið er fulltíðarstarv, sum verður sett skjótast til ber. Løn sambært sáttmálanum millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava skrivstovu- ella líknandi útbúgving og vera til reiðar at taka sær av nógvum ymiskum uppgávum. Kunnleiki til edv á brúkarastøði er neyðugur.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Janus Isfeldt, deildarleidara, tlf. 210330, janus@torshavn.fo, ella Oskar Neshamar, fyristøðufólk, oskar@torshavn.fo, tlf. 315160.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 10. november 2003. Merk umsóknina "Starvsfólkadeildin".

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



## Barnaansingin

Barnaansingin í Tórshavnar kommunu umfatar 64 dagrøktarar, 29 dagstovnar og 10 frítíðarskúlar við tilsamans 1.700 børnum í ansing.

## Dagstovnurin Lítliskógur

Í Lítlaskógi ganga 94 børn. Stovnurin er skipaður við tveimum vøggustovum og 4 barnagarðsstovum. Á stovninum arbeiða 13 pedagogar og 8 hjálparfólk.

www.torshavn.fo

## Barnaansingin í Tórshavnar kommunu

Tórshavnar kommuna søkir vegna:

**Dagstovnin Lítlaskóg eftir:**
einum pedagogi/hjálparfólki 30 tímar um vikuna í barnagarði.
Fólkið verður sett 1. desember 2003. Starvið er tíðaravmarkað til 1. juni 2004.
Umsókn saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera stovninum í hendi í seinasta lagi 7. november 2003.

Leiðari Frígerð Sundsskarð, 31 91 31
Box 217, FO 110 Tórshavn

**Vit ynskja**
at tú hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrunum og starvsfeløgunum. Dentur verður lagdur á, at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt, og megnar at taka avgerðir í tínum arbeiði.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til stovnsleiðaran ella til Katrina Petersen, samskipara, tlf. 31 51 60.

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



## Plantupakkarnir

500 plantupakkar eru í alt, harav fara 150 pakkar til Kollafjarðar.

Í hvørjum pakka er 1 træ av slagnum sitkaelri (alnus sinuata) 5 ár og framleitt á Gróðurstøðini úr føroyskum fræ 1,5 - 2,0m høg.

www.torshavn.fo

## Plantið eitt træ 2003

Aftur í ár letur Tórshavnar kommuna plantupakkar til áhugaðar íbúgvar í Tórshavnar kommunu.

**Útflýggingarseðlarnir til Havnar og bygdirnar**
verða útflýggjaðir í býráðssalinum í miðbýnum leygardagin 1. november 2003, frá kl. 14.00 til uppi er.

Plantupakkarnir kunnu heintast hjá: Skógrøkt landsins, Hvítanesvegi, Hoyvík, mánadagin 3.november 2003 millum kl. 9.00-16.00.

**Í Kollafirði verða plantupakkarnir**
útflýggjaðir til áhugað húski á p-økinum við Kollafjarðar skúla, leygardagin 1. november 2003, frá kl. 10.00-12.00, ella til uppi er.

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Handils-/vinnuhøli til leigu

Handils-/vinnuhølið, Sverrisgøta 7, verður við hesum lýst til leigu frá 15. november 2003.

Hølið er umleið 32 fermetrar til víddar.

**Meiri fæst at vita**
við at venda sær til Katrin S. Nielsen ella Jens M. Poulsen tlf. 315160.

**Umsókn**
við upplýsingum um, hvørja ætlan umsøkjarin hevur við hølinum, skal vera Tórshavnar kommunu, postsmoga 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi mánadagin 3. november 2003 kl. 12.00.

SNARSKIVAN

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 2331, Sp/f Pure Water, 700 Klaksvík.
**Viðtøkur broyttar:** 22.10.2003.
**Kapitalur:** Hækking við kr. 10.000.000,00 til kr. 16.844.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kr. 10.000.000,00 við skuldarumskifti til kurs 160.

*Skráseting Føroya tann 23. oktober 2003*

*Kristin Balle*

www.sosialurin.fo

Vikuskifti

Nr. 203 • leygardagur • 25. oktober 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

Arnhold Vegghamar og ekstrem, psykisk landsløg, málað við blottaðum nervum

Øssur Johannesen hevur samrøðu við Arnhold Vegghamar

Lesið síðu 4–7



# Bakkarakstur

Tikið er samanum. Stoytt er, og gongan savnað. Farið verður fram við bakkanum, og um eina løtu er alt í rættini. Spakuliga fer gongan, sum hon verður rikin. Bara onkur hendingur er, ið ikki hevur hug at fylga við, sum fyriskipað er

RAKSTUR
*Edvard Joensen*

Farið er um allan hagan og tað, sum í haganum gekk, er savnað saman í eina gongu, sum nú verður rikin fram við bakkanum við kós móti rættini. Tey flestu sleppa út aftur eftir viðgerð við ymsum heiligvági, men summi vera tey, sum verða tikin frá og førd víðari til aðra viðgerð, ið tey tíbetur enn ikki vita nakað um.

Heystardagurin er veiðitíð, og tað er nú, at lagt verður niður fyri til veturin. Tað liggur í okkum at hava sum mest liggjandi á goymslu, nú veturin nærkast.

Her fara tey so undan okkum norður við bakkanum. Tey, sum undan eru sloppin á skurðfjallinum. Nú er aftur boð eftir teimum, nú klippingin er fyri.

Vit taka saman um í erva og stoyta so oman heimeftir. Fara um áirnar, sum eru minkaðar munandi i góðveðrinum, sum verið hevur. Í dag er dýrdarveður. Mestsum summar, hóast farið er um veturnætur. Men ganga hvítklæddir og onkur stunar undir hitanum. Er fyrivarin og er farin í føroysk undirklæði. Heystardagur er, og langt frá bygdum eru vit staddir. Men í dag var tað betur ógjørt, sannar hann.

Vit koma oman á Barmarnar, og nú fer at treingjast samanum. Tað rekur norður við landinum her beint undir okkum, og sjógvurin fossar avstað. Æður og teistar fara við ferð framvið, og har koma tvær nísur blásandi. Eisini tær hava skund og tykjast ikki ansa troðkanini uppi á bakkanum.

Gongan er savnað, og ymsar ær fara so smátt at hyggja sær eftir møguleikanum fyri at sleppa burtur úr hesum. Ivaleyst er onkur fremmand komin fyri fram við markinum og kennir seg als ikki aftur her. Vil sleppa burtur hiðani og ikki verða kúgað soleiðis at fylgja við teimum, sum viljaleyst lata seg reka av hesum tvíbeintu, ið ganga her og halda seg eiga allan hagan, hóast tey hoyra til heilt aðrastaðni.

Men lombini, sum eftir eru, hanga afturúr. Royna at vera so nær mammuni, sum til ber. Og tá tað onkuntíð endar við, at tey misfarast, verður ein ævig jarman frá báðum pørtum.

Soleiðis fara vit norðureftir. Gjøgnum Selgjáarlíð fram við bakkanum. Eitt sindur av troðkan er um sjálva gjónna, og onkrum eydnast at smoyggja sær úr gonguni fyri bert at verða kúgað inn aftur í flokkin.

Lítil er vinningurin í einum stuttum uppreistri móti teimum, sum valdið hava. Her eru tað vit, sum ráða og siga, hvussu vera skal. So er bara at fylgja við. Líka í rættina, har ein troðkan uttan líka verður, beint sum farast skal inn um rættargarðin.

Og so standa tey har og tiva í hitanum hendan fagra heystardagin. Ivaleyst ein slíkur, Mikkjal á Ryggi yrkti um, tá hann syngur: Heystardagurin heiðursklári, fagrari eingin er um várið.

Vit loypa øði í ein fluguflokk, nú vit koma turnandi í rættina við allari gonguni. Sum lundaringur eru tær, og menn hava hug at taka til onkran bøllutan. Teir hugsa um krov og maðk og eru ikki glaðir fyri slíkar gestir hesa árstíðina.

Og at tær eru staddar nógvar fjórðingar burtur frá hjallinum, ger ongan mun. Ein fluga er ein fluga, og hon er altíð ein hóttan móti tí, sum krov hevur í hjallinum.